## Jón heldur fram í AB

AB hevur á heimasíðuni boðað frá, at teir hava gjørt nýggjan sáttmála við Jón Nielsen. Sørvingurin er kanska best kendur frá flogbóltinum, har hann er fastur partur av landsliðnum, men eisini í fótbóltinum hevur hann gjørt vart við seg. Bæði sum hart arbeiðandi miðvallari og sum vandamikil áleypari. Við heimasíðuna hjá AB sigur Jón, at hann hevur trivist væl á Argjum, og at hann tí er fegin um at kunna halda fram í felagnum.



## Nygaard til Danmarkar at spæla

Hálvi tvøramaðurin Marc Nygaard skiftir úr enska felagnum QPR til danska Randers at spæla. Marc Nygaard hevur nógvu seinnu árini spælt í útlandinum, men nú leitar álopsspælarin við føroysku ættarbondunum heimaftur til Danmarkar. 31 ára gamli Marc Nygaard skiftir nú til Randers at spæla. Síðani 2005 hevur Marc Nygaard spælt fyri enska felagið Queens Park Rangers, og áðrenn tað spældi hann í hollendskum, belgiskum og italskum fótbólti. Hann hevur spælt seks A-landsdystir fyri Danmark.

# Kærleiksoyggin 2 (2)

**Í dag prenta vit seinna partin av greinini hjá Andy Mitten frá bretska blaðnum »Fourfourtwo«, sum er skrivað eftir ein túr í Føroyum á sumri í 2006**



*Fagnaðurin var stórur í B36-leguni, tá Bergur Midjord og hinir í B36 fingu hevnd fyri 8-2 tapið í 1991*

FÓTBÓLTUR

*Andy Mitten, Manchester: Heri Simonsen týddi*

Derby-dagurin er í hondum. 40 minuttir eru til kick-off. Gundadals-leikvøllurin, sum hevur ein kapasitet uppá næstan 5.000 áskoðarar er næstan tómur fyri fólki, um ein sær burtur frá leikarunum, sum hita upp. Ein av teimum fáa, sum hyggur, er tann skaddi Ingi Højsted, sum fekk sáttmála við Arsenal í 2002, fyrst sum lærlingur. Seinni fór hann til Birmingham City, har mongu skaðarnir vóru orsøk til, at hann einans fekk 45 minuttir á eykaliðnum hjá Birmingham. Nú byrja teir fyrstu av teimum gott 2.000 áskoðarunum at koma á leikvøllin. Hesir taka allir eina dystarskrá, sum liggja í pappeskjum, har sum innkrevjarnir standa. Tað kostar umleið 7 bretsk pund at sleppa inn. Onkur viðhaldsfólk selja veddingarseðlar, har fólk kunnu vedda um úrslitið. Hvar leiðin gongur hjá viðhaldsfólkunum á leikvøllinum, veldst um hvørjum tey stuðla. HB og B36 deila heimavøllin, sum annars er ogn hjá býarstýrinum. Men feløgini hava hvør sítt felagshús við skiftirúmum og áskoðaraplássum. Áskoðaraplássini í felagshúsunum eru identisk og eru á somu síðu á vøllinum. Bæði feløgini hava pláss til uml. 600 áskoðarar við felagshúsini hjá sær. Tey flestu í HB-skýlinum halda, at talan verður um ein tættan dyst, eins tætt og tað er tað í oddinum, í føroysku liguni. Tað er ein glaður rómur millum áskoðarnar, men eingin syngur enn.

### Football´s comin home

Friðurin verður brotin við »Football´s comin home«, sum verður spældur gjøgnum leikvøllar-hátalarnar. Av tí, at hetta er heimadysturin hjá B36, so ganga spælararnir inn á vøllin frá B36-húsinum, sjálvt um HB-spælararnir hava skift í HB-húsinum. Ein maður slær uppá trummu í HB-skýlinum. Hann spennir hvørja lykkju og leggur so nógv fyri, at hann hevði staðið royndina hjá teimum strangastu heilsu- og trygdarleiðarunum. Ein maður við einum snøggum yvirskeggi sigur, at hjarta hansara pumpar fyri HB, men hann gevur B36 nøkur lovorð fyri at verða eitt gott fótbóltsfelag. Áðrenn dystin er tøgn í ein minutt fyri at minnast tey, sum eru deyð í ferðsluni seinasta árið. Frammanfyri leikarnar standa nøkur ungfólk við FIFA FAIR PLAY fløggum.

### Toftir

Dysturin verður leiktur í rættuliga høgari leikferð. Graslíkið hevur sín lut í høgu leikferðini. Áðrenn tann fyrsti graslíkisvøllurin kom í Gundadali í 1986 leiktu liðini á grúsvallum. Tað nýggja undirlagið hevur verið høvuðsorsøkin til menningina av føroyskum fótbólti, og fólk vóna nú, at fjórða ættarliðsvøllir fara at verða góðkendir av FIFA og UEFA. Tað hevði hjálpt føroyska landsliðnum stórliga. Tá Føroyar byrjaðu at taka lut í altjóða kappingum í 1990, máttu landsliðið leika heimadystirnar í Svøríki, tí tá vóru eingir grasvøllir í Føroyum. Tá lítið av flatari jørð var tøk máttu føroyingar gera nøkur ekstrem tiltøk, fyri at fáa til vega ein grasvøll. 50 tons av dynamitti vóru nýtt fyri at spreingja burtur eina rúgvu av klettum og steinum við bygdina Toftir (sum hevur 1.000 íbúgvar) fyri at fáa ein grasvøll, sum kundi lúka treytirnar hjá FIFA. Tofta Leikvøllir høvdu ein áskoðarakapasitet, sum er 6 ferðir størri enn íbúgvaratali í bygdini, og mótstøðuliðini hjá Føroyum hataðu at leika har. Eftir at hava lent í Føroyum vórðu mótstøðulið, sum Spania og Skottland tvungin at koyra ein tíma við bussi, har teir koyrdu framvið lítlum bygdum og lítlum húsum, áðrenn teir komu til Toftir. Fyrr máttu leikarnir eisini sigla við ferju, áðrenn teir komu til gistingarhúsið. Sjálvt um vindar blása, og bylgjur bróta, so slepst ikki undan at tann útlendski ferðamaðurin verður hugtikin av tí ótrúliga útsýninum við teimum grønu fjallatindunum, sum strekki seg líka niður til havið. Eisini gerast teir hugtiknir av stóra fótbóltsáhuganum. Sjálvt tær minnu bygdirnar hava ein graslíkisvøll.

### Tórshavn

Í 1997 var trýstið stórt í Tórshavn fyri at fáa ein grasvøll, sum kundi hýsa altjóða dystum. Verkætlarnir vóru lagdar fram, sum vístu ein nýggjan, snøggan leikvøll beint við leikvøllin í Gundadali. Men verkætlanin, sum alt endaði við var syrgiliga øðrvísi enn upprúna-verkætlanin. Tórsvøllur minnir mest um altjóða landhockey-leikvøllin í Milton Keynes, við sínum áskoðaraplássum við ongum taki. Um nakar tjóðarvøllur skuldi havt tak, so skuldi tað verið tann í Føroyum, sum hevur 15 regndagar um mánaðin. Viðhaldsfólkunum dáma betri leikvøllin í Gundadali. »Tað er meira tætt, og atmosferan er betri« greiðir ein áskoðari frá. Alt er relativt. Gundadalur hevur ein grasbakka við nøkrum træbonkum, sum ikki lúka bretskum standardkrøvum. Ein á rennur ikki so langt frá tí eina málinum, og seyður stendur á beiti tætt við leikvøllin.

### Kvinnan við trummuni

HB-viðhaldsfólkini syngja »HB«, meðan B36-viðhaldsfólkini syngja »B36«. Ein kvinna stendur fremst í HB-húsinum og slær uppá eina lítla trummu, og roynir at eggja viðhaldsfólkinum. Talan er um mammuna hjá nr. 5 hjá HB. »Hon er ein ógvuliga íðin kvinna. Hon rópar eisini tá hon er ósamd við dómaranum. Serliga tá teir taka avgerðir, sum raka sonin hjá henni (Rasmus Nolsøe red.).« Kvinnan er kortini kúrr tá B36 leggur seg á odda. Og hon gerst meiri kúrr tá B36 skorar sítt næsta mál. Á teimum uttanveltaðu áskoðaraplássunum hinumegin situr ein bólkur við tilkomnum áskoðarum. Stuðlar hjá báðum liðum sita saman. Tann eini býr beint við leikvøllin, og hesir møtast allir hjá tí manninum áðrenn hvørja grannauppgerð fyri at drekka eina øl. Tað er sjálvsagt meiri rómur í B36-skýlinum, men viðhaldsfólkini eru óttafull. »HB eru akkurát, sum Týskland. Teir skora altíð.« greiðir ein frá. Men tað er B36, sum skorar tað næsta málið til støðuna 3-0. Síðani fáa teir fjórða, fimta og sætta málið uttan, at HB svarar aftur. »HB, HB« syngja B36-viðhaldsfólkini speirekandi meðan tey venda sær ímóti HB-skýlinum. Ein kennir á sær, at tey ikki vilja øsa tey ov nógv. Tey vilja bara hava eitt sindur av stuttleika uppá teirra rokning. HB-viðhaldsfólkini, sum skunda sær avstað, eru ov upptikin at leggja merki til sangin.

### Óbi

Aftaná dystin, sita B36-arnir í umklæðingarrúminum og syngja á enskum: »Football´s comin home«. Tey flestu ungu í Føroyum tosa enskt. Tað ger nigerianski áleyparin Obele Okeke Onyebuchi eisini. Hann byrjaði sína yrkisleið í Póllandi, flutti síðani til Serbia, og hagani til Svøríki. Eftir hetta syrgdi